





Blástempla títt CV



# Ver við til at styrkja mentan og samfelag okkara

## – løgfrøðingur/fulltrúi til Mentamálaráðið

Hevur tú hug at royna spennandi avbjóðingina at arbeiða saman við landsins fremstu politisku og fyrisitingarligu myndugleikum innan undirvísing, gransking og mentan, so bjóða vit tær eitt spennandi fulltrúastarv á aðalskrivstovuni í Mentamálaráðnum.

**Starvsøkið**
Høvuðsuppgávurnar hjá tær verða m.a.:
- Lógarfyrireiking, kunngerðir og reglugerðir
- Ráðgeving og vegleiðing til landsstýriskvinnu, starvsfólk, stovnar og borgarar
- Vegleiðing og kunning um nýggjar lógir o.a.
- Umsiting av málsøkjum, sum verða løgd til tín
- Málsviðgerð
- Kæruviðgerð
- Aðrar uppgávur

**Førleikakrøv**
Ynskiligt er, at tú hevur løgfrøðiligt embætisprógv (cand. jur.), MA ella BA í løgfrøði. Ført tú prógv sum BA, MA ella kandidatur í summar, ert tú eisini sera vælkomin at søkja.

Tú hevur annars eitt sjálvstøðugt arbeiðslag, ert fyrikomandi og dugir væl at samstarva og samskifta við arbeiðsfelagar og viðskiftafólk. Fyrimunur er at hava viðkomandi royndir, tó at hetta ikki er krav.

**Vit bjóða**
- Eitt spennandi og sjálvstøðugt starv við fjølbroyttum uppgávum og nógvum samskifti úteftir
- Samstarv við royndar løgfrøðingar
- Luttøku í løgfrøðiligum samstarvsmótum
- Skeið og eftirútbúgving
- Starv í einum toymi við trimum løgfrøðingum

**Setanartreytir**
Starvið verður sett og lønt eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Búskapar- og løgfrøðingafelagið. Setanarøkið fevnir um stjórnarráðini, løgmansskrivstovuna og tilhoyrandi stovnum.

**Umsóknir**
Umsóknir við avritum av prógvum, CV og viðkomandi skjølum kunnu sendast til:

Mentamálaráðið
Hoyvíksvegur 72
Postrúm 3279
110 Tórshavn

ella til mmr@mmr.fo.

Umsóknir skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 25. august 2008 kl. 16.00. Starvið verður at seta frá 1. oktober ella eftir avtalu.

Vilt tú vita meira um starvið, ert tú vælkomin at seta teg í samband við Petur Petersen, aðalstjóra, tel. 555 051.

---

Mentamálaráðið hevur sum høvuðsuppgávu at fyrisita undirvísingarmál, mentamál og gransking. Harafturat eru uppgávur viðvíkjandi kirkju, loftmiðlum, ítrótti og øðrum frítíðarvirksemi.

Á aðalskrivstovuni eru stápsfunktiónir innan m.a. løgfrøði, búskap, HR, kunningartøkni og fyrisiting. Bygnaðurin í Mentamálaráðnum er býttur í tríggjar deildir – fólkaskúladeild, vinnu-/miðnámsskúladeild og mentamáladeild – sum stápsfunktiónirnar veita ráðgeving til, umframt at tær ráðgeva aðalstjóranum og landsstýriskvinnuni.

**Mentamálaráðið**

SENDISTOVAN